## Finnur til Neistan



Neistin kundi um vikuskiftið avdúka, at felagið hevur gjørt avtalu við Finnur Hansson, sum skal styrkja um hópin komandi kappingarár. Við hesum hava meistararnir styrkt um hópin við tveimum av fremstu spælarunum í landinum, tí fyri stuttum varð avtala eisini gjørd við David Edvardssen, sum kemur úr StÍF. Finnur Hansson spældi í vetur við Kyndli, men hann var eisini partur av mansliðnum hjá Neistanum, sum í 2000 vann FM-heitið.

## ÍF Føroyar vann í triðju royndini

ÍF Føroyar hevði frívikuskiftið, men týskvøldið tóku føroysku útisetarnir ímóti Bispebjerg. Frammanundan hevði ÍF Føroyar tapt sínar báðar dystir, men í triðju royndini vendi skútan og liðið er aftur á sigurskós. Erling Fles legði ÍF Føroyar á odda tíðliga í dystinum, men í hálvleikinum var Bispebjerg á odda 1-2. Føroysku leikararnir fullu tó ikki í fátt, og við tveimum málum í seinna hálvleiki, tryggjaði Erling Fles føroyska liðnum í Seriu 1 fyrsta sigurin í ár. Soleiðis vann ÍF Føroyar 3-2, og ikki óvæntað valdu liðfelagarnir trímálaskjúttan Erling Fles til dagsins leikara.

# Bert trý stig á muni í oddinum

**Manchester United hevði undan fjórðseinasta umfarinum í Premier League eina leiðslu, upp á fimm stig. Eftir 35. umfar er leiðslan nú bert trý stig, og enn skal oddaliðið á vitjan hjá Chelsea**

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

35. umfar av Premier League varð spælt um vikuskiftið, og eru tað nú bert trý umfør eftir í kendu ensku fótbóltskappingini. Undan hesum fjórðseinasta umfari, vóru meistararnar frá í fjør, Manchester United, heili fimm stig á odda, men eftir bert at fáa javnleik móti Blackburn, samstundis sum Chelsea vann sín dyst, eru bert trý stig á muni, og tað er skjótt at heinta. Serliga tá hugsað verður um at Chelsea hevur heimadyst móti United í næstu viku. Stóri spurningurin er so, hvørt United megnar at reisa seg til røttu løtuna, sum teir so mangan áður hava megnað, ella um Chelsea hinvegin fer at vinna seg inn á United, og harvið skriva seg í søgubøkurnar, við einum »comeback« av teimum heilt stóru. So alt bendir á, at vit í ár fáa ein sera spennandi enda á kappingina, ið rættuliga nógvir føroyingar fylgja øðliga spentir við í.

### Flott »comeback«

Chelsea vann seg upp á triðja plássið í Premier League í 15. umfari, og har hava teir verið í stórar partar av kappingini, takkað verið stabiliteti og javnt góðum úrslitum. Chelsea hevur so eisini í seinastuni, aftaná at Arsenal byrjaði at rapa niðureftir, megnað at vunnið seg upp á næsta pláss, og í hesum fjórðseinasta umfari eru teir nú bert trý stig frá United, við einum heimadysti móti júst teimum í næsta umfari, so ikki er tað undrunarvert, um vónirnar eru høgar í bláa partinum av London. Chelsea vann framskundaða dystin móti Everton 1-0, og einsamalla málið skoraði ghanesiski Michael Essien.

### Mundu blakað alt á gólvið

United hava havt enn eitt gott kappingarár, og serliga Cristiano Ronaldo hevur verið flúgvandi, við sínum mongu og týdningarmiklu málum, men um vikuskiftið var tað ein annar harri, ið skuldi vísa seg at koma teimum til hjálpar. Argentinski áloyparin Carlos Tevez hevur sannuliga víst sítt virði í kappingarárinum, og hevur meira enn einaferð verið munurin í dystum, har United annars hevur havt trupuleikar. Aftur hesaferð, tá alt sá út til at ganga av skriðuni, og United hevði brent eitt hav av møguleikum, kom lítli Tevez, Reyðu Djevlunum til hjálpar, tá hann setti krúllin undir bóltin, eftir eitt hornaspark, ið Paul Scholes hevði forlongt. Tað restaðu tá bert tveir minuttir, og tað var nokk til at tryggja United frá einum óhepnum tapi. Tí í fyrsta hálvleiki hevði Roque Santa Cruz lagt heimaliðið Blackburn á odda.



*Talan var um eitt tað týdningarmesta málið, sum Tevez hevur skotið fyri Manchester United. Javnleikurin bar við sær, at tað enn eru trý stig niður til Chelsea, og hartil hevur Manchester United ein málmun, sum í veruleikanum er verdur hálvt stig eykа*

*Mynd: Polfoto:AP*

### Liverpool mest sum tryggjaðir

Liverpool hevur havt enn eitt kappingarár, har teir hava blakað týdningarmikil stig burtur í dystum, har teir annars hava kontrollera fullkomuliga. Øll hesi óneyðugu stigini hava so sjálvandi eisini havt við sær, at teir hava havt trupult við rættuliga at fáa fatur á teimum trimum fremstu, og verða væntandi noyddir til at taka til takkar við einum fjórða plássi. Ikki nakað teir í Liverpool høvdu væntað sær, men hóast tað, sera týdningarmikið, tí fjórða pláss gevur atgongumerki til Champions League fótbólt í næsta kappingarári, og eisini teimum mongu milliónunum av pengum, ið amerikansku eigarar felagsins, sera glúpskir elta við glytrandi eygum.

Seinastu dystirnar hevur Liverpool tó fingið stáplað nakrar sigrar uppá beinini, og við 2-0 sigrinum á útivølli móti Fulham um vikuskiftið, samstundis sum Everton tapti móti Chelsea, eru »The Reds« nærum sikraðir á fjórða plássi. Málini hjá Liverpool skutu Jermaine Pennant og Peter Crouch.

### Úrslitini í 35. umfari

| | |
|---|---|
| Arsenal-Reading | 2-0 (Adebayor, Gilberto) |
| Aston Villa-Brimingham | 5–1 (Young 2, Carew 2, Agbonlahor - Forssell) |
| Blackburn-Man. Utd. | 1-1 (Santa Cruz - Tevez) |
| Everton-Chelsea | 0-1 (Michael Essien) |
| Fulham-Liverpool | 0-2 (Pennant, Crouch) |
| Man. City-Portsmouth | 3-1 (Vassell, Petrov, Benjani - Utaka) |
| Middlesbrough-Bolton | 0-1 (Gavin McCann) |
| Newcastle-Sunderland | 2-0 (Michael Owen 2) |
| West Ham-Derby | 2-1 (Zamora, Cole - Mears) |
| Wigan-Tottenham | 1-1 (Heskey - Berbatov) |